Viðtøkur fyri

# Eldraráð í Vágum

**Eldraráð í Vágum**

Stýri fyri Heimatænastuna í Vágum, hava fyribils gjørt av, at nevndin í Vága Pensjónistafelag virkar sum Eldraráð, og skal verða tikin við upp á ráð, tá týðandi umskipanir, bygnaðarbroytingar og avgerðir innan økið skulu fremjast, sum hava týðandi ávirkan á tænastuna hjá borgarum í økinum.

**Eldraráðið ráðgevur Stýrinum fyri Heimatænastuna í øllum eldrapolitiskum spurningum og er bindilið millum teir eldru borgararnar og kommunurnar.**

**Eldraráðið kemur við hugskotum og virkar fyri, at vitan og royndir hjá teimum gomlu verða virðismett og gagnnýtt.**

**Eldraráðið kann:**

- **Úttala seg um eitthvørt evni, sum hevur áhuga hjá teimum gomlu**
- **Koma við hugskotum og uppskotum**
- **Seta spurningar um eldrapolitikkin og fíggjarætlanina.**

**Eldraráðið eigur ikki at viðgera mál viðvíkjandi ávísum persónum.**

**Viðtøkur fyri Eldraráðið**

§ 1
**Endamál**

Eldraráðið er ráðgevandi hjá stýrinum fyri Heimatænastuna í Vágum, og fær í lag samskifti millum eldru borgararnar og stýri.

Stk. 2
Eldraráðið verður kunnað um tiltøk, sum hava týdning fyri tey eldru, og eigur at samarbeiða við Heimatænastuna í Vágum fyri at tryggja, at atlit verður tikið til ynskir og tørv teirra eldru.

Stk. 3
Eldraráðið skal koma við hugskotum og virka fyri, at vitan og royndir hjá teimum gomlu verða virðismett og gagnnýtt.

§ 2
**Heimild**

Løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., **§ 6.** Kommunurnar skulu tryggja, at borgarar í størst møguligan mun hava møguleika at verða hoyrdir, tá týðandi umskipanir, bygnaðarbroytingar o.t. verða framdar, sum hava ávirkan á tænastuna í økinum.

*Stk. 2.* Kommunurnar kunnu seta á stovn eldraráð í økinum, sum verða tikin við upp á ráð, tá avgerðir og umskipanir innan økið skulu fremjast.

Eldraráðið veitir ráð í eldrapolitiskum spurningum og virkar sum ein samskiftisstovnur millum eldru borgararnar og kommunurnar.

Stk. 2
Stýri fyri Heimatænastuna kunnu spyrja og samskifta við Eldraráðið um tað, sum viðvíkur teimum eldru.

Stk. 3
Eldraráðið kann av sínum eintingum siga stýrinum fyri Heimatænastuni sína hugsan um eitthvørt evni av almennum áhuga fyri tey eldru, koma við hugskotum og uppskotum og seta spurningar.

**§ 3**
**Starvsháttur Eldraráðsins**

Eldraráðið skal kunna seg um ynskir og tørv teirra gomlu og um kommununar viðuskifti á eldraøkinum.

Stk.2
Eldraráðið skal virka fyri áhaldandi kunning til tey eldru um broytingar og nýskapan á eldraøkinum.
Stk. 3
Eldraráðið skal halda fast um at útbyggja samskiftið við sýri fyri Heimatænastuna gjøgnum framhaldandi meting av tiltøkum á eldraøkinum. Og harvið menna og tillaga tey samsvarandi samfelagsmenningini.

**§ 4**
**Eldraráðsins samanseting**

Tað er sjálvboðið at vera limur í Eldraráðnum. Samsýning verður latin fyri fundir við stýri og vegna fundir sum eru í samband við arbeiðið eldraráðsins og endurgjald verður veitt fyri skjalaprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum av oynni .

Stk. 5
Stýrið fyri Heimatænastuna setir eina upphædd á fíggjarætlanini til Eldraráðsins virksemi.

Stk. 6
Kommunurnar veita fundarhøli og hølir til almennir fundir.

§ 7

**Gildiskoma/Íverksetan**

Viðtøkurnar koma í gildi, tá tær eru samtyktar í stýrinum fyri Heimatænastuna.

§ 8

**Broytingar í viðtøkunum**

Eldraráði (Vága Pensjónistafelag), ella ein meiriluti, kann koma við uppskoti til stýri fyri Heimatænastuna um broytingar í viðtøkunum.

Stk. 2
Kommunustýri kann koma við uppskoti til broytingar í viðtøkunum.

Stk. 3
Broytingar í viðtøkunum koma í gildi tá tær eru samtyktar í stýrinum fyri Heimatænastuna.

§ 9

**Um at taka Eldraráðið av**

Stýri fyri Heimatænastuna kann til eina og hvørja tíð gera av, at gera broytingar fyri Eldraráðið ella at tað verður tikið av. Áðrenn tílík avgerð verður málið í góðari tíð frammanundan lagt fyri Vága Penjónsitafelagið, sum virkar sum Eldraráð til ummælis.

Stk. 2
Verður eldraráðið tikið av, fella allar møguligar ognir v.m. til Heimatænastuna í Vágum.

Samtykt á stýrisfundi tann. 24.08.2016

Formaður fyri stýrið, Rósa Samuelsen